# Kuupik Kleist lagdur undir korrupsjón

**Ein nevnd hjá grønlendska Landstinginum skal nú taka støðu til, um landsstýrisformaðurin og ein av landsstýrismonnunum eru sekir í korrupsjón**

Árni Joensen

**Grønland:** Tað er andstøðuflokkurin Siumut, sum er komin við teirri álvarssomu skuldsetingini. Upprunaliga varð tosað um vina- og kenningapolitikk, men nú er Siumut-formaðurin, Aleqa Hammond, farin at brúka orðið korrupsjón.

Kjarnin í málinum er, at Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, og Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í ráevnismálum, eru sera nær tengdir at leiðsluni í námsfelagnum Greengems, sum hevur fingið loyvi frá landsstýrinum at leita eftir smaragdum. Grethe Kramer Berthelsen, sum er gift við Ove Karl Berthelsen, er stjóri og nevndarlimur í felagnum, og Aviâja Vandersee, sum er sambúgvi hjá Kuupik Kleist, er nevndarformaður. Tær báðar komu í leiðsluna í felagnum fyri teir báðar, tá verandi landsstýri bleiv skipað.

– Eg vil hava nevndina at taka støðu til, um mannagongdin í hesum máli ikki er vina- og kenningapolitikkur og korrupsjón ella júst tað, sum landsstýrið skuldi rudda av vegnum, sigur Aleqa Hammond við tíðindastovuna Ritzau. Hon leggur



*Aleqa Hammond, formaður í Siumut*



*Kuupik Kleist, landsstýrisformaður*



*Ove Karl Berthelsen, landsstýrismaður í ráevnismálum*

afturat, at hon sóknast eftir politiskari og moralskari ábyrgd.

### Úr leysum lofti

Over Karl Berthelsen var ikki á fundinum, tá landsstýrið viðgjørdi umsóknina frá Greengems um at sleppa at leita eftir smaragdum. Tað hevur landsstýrið upplýst, men einki varð sagt um Kuupik Kleist í tí sambandi. Landsstýrisformaðurin sigur, at hann hevur einki ímóti, at málið verður kannað.

– Tað er í fínasta lagi, at tey vilja hava málið kannað. Eg haldi, at tey skulu koma við øllum teimum avdúkingum, sum tey siga seg hava, og at málið skal kannast sum skjótast, sigur Kuupik Kleist.

Landsstýrisformaðurin leggur afturat, at skuldsetingøarnar hjá Siumut-formanninum eru tiknar úr leysum lofti, og at alt er farið rætt fram.

*arni@sosialurin.fo*


## Handilslærlingur

**Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda umsókn við prógvum er 31. oktober 2010.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00 – Símun Askham.

**pf Maria Poulsen**
Box 182 · FO-110 Tórshavn